

*Jógvan Jørgensen í Havn keypti tann fyrsta Chevrolet Cruze frá Auto Service*

# Fyrstu Chevrolet til Auto Service

Mánadagin fekk Auto Service teir fyrstu Chevrolet bilarnar, eftir at teir alment yvirtóku Chevrolet umboðið frá 1. juni 2009.

Talan er um spildurnýggja Chevrolet Cruze, sum er ein sera væl útgjørdur bilur í miðalklassanum.

Bíligasti Cruze kostar 199.000 kr., meðan luksusútgávan við allari útgerð sum t.d. leðurkabinu, automatiskum klimaanleggi og navigatión kostar 229.000 krónur.

**mg**


*Auto Service hevur fingið teir fyrstu Chevrolet bilarnar*

# Iveco hybridbilur til Coca Cola



*Iveco hybridbilurin verður latin til og Coca Cola Enterprises í Bruxelles*

Italska vørubila- og lastbilaverksmiðjan Iveco hevur latið ein Iveco Eurocargo hybridbil við dieselog el-motori til Coca-Cola Enterprises í Bruxelles. Hetta er fyrstu ferð, at ein slíkur bilur verður settur inn í koyring í einum europeiskum stórbýi.

Coca-Cola Enterprises hevur valt at fara í samstarv við Iveco um hesa verkætlan, sum hevur til endamál at kortleggja møguleikarnar fyri at nýta hybrid teknologi í vinnubilum.

Bilurin, sum varð latin til Hubert Patricot, sum er forstjóri í Coca Cola Enterprises Europe, verður nýttur til at koyra Coca Cola vørur í Bruxelles. Hesin hybridbilurin, ið hevur ein dieselmotor við 160 hk, sum arbeiðir saman við einum elektromotori við 60 hk, brúkar 30 prosent minni av brennievni sammet við ein vanligan dieselmotor við somu effekt.

Hubert Patricot forstjóri í Coca Cola Enterprises sigur, at vit hava sett okkum sum mál at kombinera framhaldandi vøkstur í søluni av Coca Cola produktum, samstundis sum vit allastaðni har vit koma nýta minst møguligt brennievni og dálka umhvørvið so lítið sum til ber.

Hann leggur afturat at samstarvið við Iveco er sera spennandi og er bert byrjanin til hvussu vit kunnu menna eina burðardygga flutningsstrategi á øllum okkara søludeildum í Evropa.

**mg**

# rjir umhvørvið

*Fríggjadagin fekk Reyni Service umhvørvisgóðkenning frá DuPont, f.v.: Magnus Pauli Udbø (Muddi), lakkerari, Páll av Teiginum, leiðari á plátu- & lakkverkstaðnum, Hans Wittendorff frá DuPont í Danmark, og Sámal Olsen frá lakkdeildini hjá Vøruhúsinum*




*Hans Wittendorff frá DuPont og Muddi Udbø frá Reyni Service*

# Áki útbúgvin Nissan teknikari

Týsdagin tók Áki Simonsen hjá Auto Service hægstu útbúgving frá Nissan Nordic sum teknikari til umvæling av Nissan bilum. Sum nakað nýtt hevur P/F Auto Service fingið í lag eina avtalu við Nissan Nordic, um at øll eftirútbúgving av Nissan teknikarum nú fer fram í Føroyum.

Nissan setur strong krøv til verkstøðini hjá sínum forhandlarum. Útbúgvingarnar til Nissan teknikarar eru á trimum fakligum stigum: Fyrsta stig snýr seg um grundleggjandi vitan, annað stig um generella vitan, og triðja stig snýr seg um høga tekniska vitan, góð evni til feilfinning og góðan kunnleika til nýtslu og handfaring av Nissan testútgerð. Allar handbøkur, sum arbeitt verður við, eru á enskum.

Áki er tann fyrsti sum hevur tikið hesa útbúgving í Føroyum, men aðrir teknikarar eru undir útbúgving. Próvdómarin, Hans Moth Vestergaard frá Nissan Nordic, sigur, at P/F Auto Service uppfyllir tey strangastu fakligu krøvini frá Nissan.



*Áki Simonsen frá Auto Service og Hans Moth Vestergaard frá Nissan Nordic*

*Mynd: Heðin Weihe*

**mg**